# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Sosialurin fyri 25 árum síðan:

## Hildu eftirnavnið vera kinesiskt

**Sosialurin 20. januar 1983**

Í blaðnum er eisini ein stuttlig grein um Petur í Gong, býráðslim í Havn, sum umboðaði Tórshavnar býráð, tá Keypmannahavn kundi hátíðarhalda sín 800 ára føðingardag. Eftirnavnið »í Gong« gjørdi, at hann kom at búgva millum kinesisku gestirnar á ein hotelli í Keypmannahavn.


tíðindablaðið
sosialurin
56. árg. • kr. 4,-
Nr. 8 • hósdagur 20. januar 1983

### Tá Gong endaði millum kinverjarnar

[illegible]



*Petur í Gong var ein kend býarmynd í Havn, bæði sum byggimeistari og sum býráðslimur, har uttanflokkalistin hjá honum í mong ár var størsti listin í býráðnum. Petur í Gong andaðist 15. mai 2003, 79 ára gamal.*

## Realskúlaflokkur í 1964



Her er ein av myndunum frá stóru realskúlaframsýningini, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í summar. Her er 2.c í Realskúlanum í 1964.

**Aftarta rað f.v.:** Karsten Simonsen, Steingrím Samuelsen, Brenda Thomsen, Trygvi Simonsen, Anna Katrina Næs Joensen (Dukki), Jógvan við Á́nna, lærari, Hergerð Krosstein, Bette Johansen, Peddy Davidsen, Birgir Mortensen, Rannvá Lindarstein og Maria Mortensen

**Fremst f.v.:** Bogi Mikkelsen, Bergur Djurhuus og Ólavur Michelsen

*Myndaeigari: Peddy Davidsen*

†

### Andlát og jarðarferðir

**Áki Karbech Mouritsen, úr Tórshavn**, búsitandi í Roskilde, andaðist hósdagin, 63 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Sct. Jørgensbjerg kirkju í Roskilde mikudagin klokkan 12.

**Rita Bech úr Lopra** andaðist í heiminum sunnudagin, 66 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Hákun Echolm Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 66 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum týskvøldið kl.18.00. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni

**Andrias Reinert Samuelsen í Tórshavn** andaðist sunnudagin, 57 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum heim í Ebenezer týsdagin klokkan 16. Jarðarferðin verður úr Ebenezer mikudagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Andrias kunnu lata Kristnastovu eina gávu. Konta í peningastovnunum.

### Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara kæri maður, pápi, verpápi og abbi

**Fannhard Skoradal**
Norðragøta

varð sjúkur, doyði og varð jarðaður.
Takk til starvsfólkið á B7 og onkologiska ambulatoriinum fyri, at tit tóku tykkum so væl av okkum.
Takk til tykkum, sum vitjaðu. Takk fyri umsorgan og forbøn. Takk til Niels Jacob Nielsen, John Petersen, Torleif Johannesen og Martin Restorff Jacobsen fyri góð og troystarrík orð.
Takk til kirkjutænarar, organistar, sangarar og gravarar.
Vit takka eisini hjartaliga fyri ta stóru umsorgan og kærleika, ið vit kendu frá familju, vinum og bygdarfólki.
Takk til tykkum, sum bakaðu og góvu til ervið.
Eisini ein stór tøkk til tykkum, sum tóku tykkum av ervinum.
Takk til øll tykkum mongu, sum fylgdu.
Takk fyri blómur, kransar, heilsanir og uppringingar.

*Familjunnar vegna*
**Sølva, May-Britt, Anton, Jan, Sólfríð og Harda**

**Dagurin**
**23. januar. Emerentius.** Navnið er komið skeivt fyri; tað skal vera Emerentiana, deyð umleið ár 300 (í gomlum álmanakkum Emerent). Hon var vinkona við Agnas (sum varð tikin av døgum umleið ár 300) og var steinað til deyða, tá ið hon fylgdi vinkonuni og harðliga hevði at teimum, sum píndu og drupu hana.